From: Joannes Dali <joannes.dali@gmail.com>
Sent: týsdagur, 6. januar 2026 15:15
To: Journalin hjá LMS <lms@lms.fo>; Løgting <logting@logting.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: Hvussu eitt omanlop kann gera nyttu í "Suðuroyartunnilsverkætlanina".

Til Løgtingsins fíggjarnevnd, og Løgmannsskrivstovuna, Føroya Løgting, Landsverk og onnur.

Hvussu eitt omanlop kann gera nyttu í "Suðuroyartunnilsverkætlanina".

Við hesum teldiposti sendi eg samstundis tríggjar teldupostar, sum eg áður havi sent til Nýskipanarnevndina og til fíggjarmálaráðið, sum m.a. er um eina fergurutu millum Hvalba og Sand, til tess at minka um árligu útreiðslurnar av leið 7, og samstundis munandi at betra sambandið við Suðuroynna, hetta í einum liði í verkætlanin hjá mær um eina byrging til Skúgvi, og haðani at bora víðari longur suður.

Eg vil - staðiliga - vísa á, at tað longu nú kann farast undir at gera byrgingina við tí rúgvursmikla gróti, sum er komið frá nýggja omanlopinum sum var í Skúgvi, og at grótsteinarnir hava eina - blandað - stødd sum er sera vælegnað til byrging - eisini til dekkgrót - og um hetta arbeiðið bleiv gjørt longu nú, so vóru øll ivamál viðvíkjandi einum fyribils havnalagi í Skúgvi - sum hevði kostað yvur 100 milliónir - skúgvað til viks, tí so kundi koyrast líka av Skarvanesi til Skúgvi áðrenn klárt var at fara undir at bora.

Hetta (for)-arbeiðið kann bjóðast út alt fyri eitt - eisini á ein hátt, so at fleiri kunnu fáa lut í arbeiðinum samstundis - næstan sum at avreiða fisk - tí tað snýr seg einans um at "fiska" nakrar steinar og sigla teir - næstan - til lands.

Har prámar eru, sum hava stuðulsbein at standa á, so kunnu lyfta - og laða - grótið uppá turt.

Og goldið verður pr. kg.

Í hesum telduposti viðleggi eg myndir av hvørjar typur av grótbátum (grótflakum) sum eru vælegnaðir at taka og flyta grótið úr omanlopinum til byrgingina, nevniliga "split"-grótbátar við fløtum stevni og við einum koyrandi krana, við longum bummi á dekkinum, ein annar typa við stuðulsbeinum og grabbikrana, og ein flatbotnaður prámur við langari landgongd, har lynningarnar kunnu leggjast niður so gummihjólslessarar kunnu koyra inn á mølina og lasta prámin og koyra eftir bóglúkuni, og grótið kann so skumpast útav til báðar síður av sama gummihjólslessara.

Hetta er tann skjótasta og allar bíligasta mátin at fáa eina byrging til vega, har tilfarið er tikið beinleiðis úr mølini (náminum), er stuttflutt og burðadygd.

Tað besta er, at hetta arbeiði kann byrja beinan vegin, tí Landsverk hevur longu gjørt eitt projekt - eftir tilráðing frá mær í 2014 - viðvíkjandi hvussu byrgingin kann gerast - og sum ikki nýtist at vera samskipað við nøkrum øðrum arbeiði, og vil so skjótt byrgingin er liðug spara landinum fyri meira enn 20 mill. um árið, tí siglingin við Sildberanum og tyrluflúgvingin til Skúgvi tá verður óneyðug.

Hetta er - bókstaviliga - ein gáva frá nattúruni - okkara náttúruríkidømi, okkara náttúrutilfangi - sum vit skulu vera takksom fyri at eiga - og kunnu taka ímóti við takksemi.

Vinaliga
Jóannes í Dali